# LISTALEYPURIN

SKÚLAÁRIÐ 16–17



HANNI BJARTALÍÐ **SKULPTURUR, RELIEF, MYNDIR OG ANNAÐ, VERKSTOVA** .......... 4
3.–7. oktober og 17.–21. oktober 2016

JUEL OG NISSEN **HIPP HOPP, VERKSTOVA** .......... 6
17.–21. oktober 2016

DÁNJAL **INTERAKTIV KONSERT** .......... 8
31. okt–4. november 2016

THE YELLOW DUCK EXPERIENCE **KONSERT OG FRÁGREIÐING, HEIMSTÓNLEIKUR** .......... 9
31. oktober–4. november 2016

MEDUNA **BYGGILIST, VERKSTOVA VIÐ FRAMSÝNING** .......... 10
Frá 3. november 2016 og frameftir

SISSAL KAMPMANN **YRKJARAVERKSTOVA** *ØKISLISTAFÓLK* .......... 12
November 2016

RAKEL HELMSDAL **DUKKULEIKUR, VERKSTOVA** *ØKISLISTAFÓLK* .......... 14
Januar 2017

DOMINO EFFEKTEN **FRAMFØRSLA** .......... 16
9.–13. januar 2017

HEIMA ER HAR, SUM HJ(ART)AÐ ER **LJÓSLIST, VERKSTOVA VIÐ FRAMSÝNING** .......... 18
Februar 2017, eftir avtalu

KÓRLÆRA VIÐ KATA **VERKSTOVA OG ENDAKONSERT** .......... 20
6.–10. februar 2017

KJØKKENET **SJÓNLEIKAFRAMFØRSLA OG VERKSTOVA** .......... 22
3.–7. apríl 2017

TØRST **CONTEMPORARY DANSISÝNING VIÐ VERKSTOVU** .......... 24
17.–21. apríl 2017

DAGAMBA ENSEMBLE **CROSSOVER-TÓNLEIKUR, KONSERT** .......... 26
18. apríl–1. mai 2017

FIGURA ENSEMBLE **TÓNASMÍÐ, VERKSTOVA** .......... 28
26. apr.–3. mai 2017

TENTACLES **VERKSTOVA Í EVNING OG SKRÚÐGONGA** .......... 30
8. mai–12. juni 2017

# VÆLKOMIN TIL LISTALEYPIN
# **SKÚLAÁRIÐ 16–17**

Í skránni hetta skúlaárið finna tit tilboð um skúlavitjanir av listafólkum, sum fáast við myndlist, byggilist, dans, leiklist, tónleik, orðlist og installatións-list.

Flestu tiltøkini hava eina verkstovu sum part av vitjanini. Hetta er, tí royndir vísa, at næmingar – og kanska vit øll – fáa mest burtur úr listini, um vit (eisini) sjálv sleppa at vera virkin.

Vit mæla til at fylgja við á okkara heimasíðu, www.listaleypurin.fo. Har finna tit skráir, fyrireikingartilfar, eftirmetingarskjøl, myndir, filmsbrot og tilvísing til heimasíður hjá listafólkunum.

Á heimasíðuni er eisini frágreiðingin um verkætlanina Økislistafólk, har tvey listafólk komu á vitjan einaferð um vikuna í ein heilan mánað. Verkætlanin eydnaðist framúr væl og varð avgjørt at royna hetta aftur. Í ár er orðlist á skránni, bæði skrivað á pappír, lisin upp og spæld.

Pall-listafeløg í grannalondunum, saman við Listaleypinum, hava arbeitt við at framleiða ein portal, har ung sjálv fáa amboð til at ummæla sínar listaupplivingar, í flokkinum ella hvør sær. Portalurin Iris fer at liggja á adressuni, www.mittiris.com, og verður latin upp á fýra málum, eisini á føroyskum, í heyst. Slóð til síðuna verður á www.listaleypurin.fo og á www.nam.fo.

Tá ið skúlin byrjar, verður nýggjur verkætlanarleiðari fyri Listaleypin settur. Eg vil takka fyri meg á hesum sinni, og fari víðari til eitt norðurlendskt starv í Helsinki komandi árini.

Nýggi verkætlanarleiðarin verður kunngjørdur á okkara heimasíðu við skúlaársbyrjan.

Við bestu ynski um gott skúlaár 2016–17,
**Hedvig Westerlund-Kapnas**

### SOLEIÐIS VIRKAR LISTALEYPURIN:

- Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.
- Skúlar og forskúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla út teldutøkt tekningarskjal á listaleypurin.fo.
- Verkætlanarleiðarin váttar bíleggingina og skipar fyri skúlavitjanum í samráði við skúla og listafólk.
- Eftirmetingarskjal verður sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at tað verður útfylt.

### VIT MÆLA TIL:

- at næmingaumboð eru við til at velja tey listaverk, ið skúlin biður um.
- at næmingaumboð taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum.
- at skúlin framhaldandi ger vart við síni ynski, hóast ógjørligt er at eftirlíka øllum ynskjum.
- at lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini, sum verður latin inn miðskeiðis í september.
- at teldutøka tekningarskjalið fyri alt árið verður sent inn áðrenn **15. september 2015.** Eftir hetta verður skráin løgd fyri árið.



*Listaleypurin tekur fyrivarni fyri møguligum broytingum*

LISTAGREIN:
## SKULPTURUR, RELIEF, MYNDIR OG ANNAÐ, VERKSTOVA

**Heiti:** **TÁ IÐ EG VERÐI STÓRUR**

**Listafólk:** Hanni Bjartalíð, myndlistamaður

**Málbólkur:** Forskúlar og serflokkar, ein flokkur.

**Longd:** Tveir dagar við verkstovu, framsýningin kann verða á skúlanum í ein mánað.

**Høli:** Alt kann brúkast.

**Krøv:** Avtala verður gjørd við skúlan um, hvat tilfar skal nýtast.

**Tíðarskeið:** 3.–7. oktober og 17.–21. oktober 2016









» HETTA ER EIN VERKSTOVA OG FRAMSÝNING, IÐ SKAL VÍSA, HVUSSU MARKLEYS OG BREIÐ LIST KANN VERA, OG AT LIST TILFARSLIGA KANN EVNAST TIL ÚR SO AT SIGA ONGUM. FELAGS EVNI VERÐUR UMHVØRVIÐ. FORSKÚLANÆMINGARNIR FARA AT SKAPA LIST Í TVEIR DAGAR, OG FRAMSÝNINGIN, SAMAN VIÐ NØKRUM VERKUM, SUM HANNI BJARTALÍÐ HEVUR VIÐ, KANN VERÐA VERANDI Á SKÚLANUM Í EIN MÁNAÐ.

LISTAGREIN:
# HIPP HOPP, VERKSTOVA

**Heiti:** **HIPP HOPP FYRI BØRN OG UNG**

**Listafólk:** Juel og Nissen, DK

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur, í mesta lagi 30 næmingar til verkstovuna.

**Longd:** 4 skúlatímar. Um skúlin ynskir tað, ber til at leggja ein spurnartíma afturat.

**Høli:** Nóg stórt til øll at dansa í.

**Krøv:** Anlegg, sum kann setast til Ipad.

**Tíðarskeið:** 17.– 21. oktober 2016



VERKSTOVAN, „HIPP HOPP FYRI BØRN OG UNG", BÝÐUR TIL EINA FELAGS DANSIUPPLIVING VIÐ GÓÐUM TÓNLEIKI OG KENDUM RØRSLUM (MOVES), OG RÚM ER FYRI SKAPANDI EVNUNUM. VIT HYGGJA EISINI NÆRRI AT, HVAT HIPP HOPP-MENTANIN Í ROYND OG VERU ER. HVUSSU BYRJAÐI HON, HVØRJI GRUNDVIRÐI BYGGIR HON Á, OG IKKI MINST, HVAT ER HIPP HOPP-MENTAN Í DAG?

MAJA JUEL HANSEN OG TRINE DAMBERG NISSEN HAVA FLEIRI ÁRA ROYNDIR VIÐ VERKSTOVUNI, „HIP HOP-ENS VERDEN", Í FÓLKASKÚLUM, STUDENTASKÚLUM, EFTIRSKÚLUM OG HÁSKÚLUM Í DANMARK.



LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

LISTAGREIN:
## TÓNLEIKUR

**Heiti:** **KONSERT VIÐ DÁNJALI**

**Listafólk:** Dánjal á Neystabø við bólki

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur. Í sambandi við vitjanina verður arbeitt saman við einum ella tveimum flokkum. Konsertin er fyri øll, einki minsta- ella mestamark.

**Longd:** 45–60 minuttir.

**Høli:** Høli við streymveiting. Myrkalegging er ein fyrimunur, men ikki krav.

**Tíðarskeið:** 31. okt–4. november 2016



» „OKKARA TANKI ER AT SETA FERÐ Á HUGFLOGIÐ HJÁ ÁHOYRARUNUM OG AT SETA OKKURT Í GONGD. TEKSTIRNIR OG TÓNLEIKURIN SÝNA OFTA EINA IRONISKA FRÁSTØÐU FRÁ TRONGSKYGDARI, VESTURLENDSKARI UPPFATAN AV HEIMINUM. VIT GEVA NÆMINGUNUM EINA INTERAKTIVA KONSERTUPPLIVING, SUM TEKUR STØÐI Í ÁHOYRARUNUM. TESSVEGNA ERU FLEIRI SANGIR SKRIVAÐIR SOLEIÐIS, AT TAÐ ERU OPIN STYKKI, STÝRD AV SPONTANITETI."
HARUMFRAMT FÁA NÆMINGARNIR UNDIRVÍSINGARTILFAR AT FYRIREIKA SEG VIÐ.



LISTAGREIN:
## KONSERT OG FRÁGREIÐING, HEIMSTÓNLEIKUR

**Heiti:** **THE YELLOW DUCK EXPERIENCE**

**Listafólk:** Chris Ruebens, NL, og Saulius Petreikis, LT

**Málbólkur:** 0.–10. flokkur, 15–50 næmingar.

**Longd:** 45 minuttir.

**Høli:** Eingi serlig krøv.

**Tíðarskeið:** 31. oktober–4. november 2016

» HEVUR TÚ ALTÍÐ VILJAÐ SPÆLT Á EITT LJÓÐFØRI, MEN IKKI VITAÐ, HVUSSU MANN GER? HEVUR TÚ ALTÍÐ VILJAÐ GJØRT TÍN EGNA TÓNLEIK, MEN IKKI VITAÐ, HVUSSU TÚ FERT Í GONGD? SAULIUS PETREIKIS, MULTIINSTRUMENTALISTUR OG TÓNASKALD, BJÓÐAR TÆR SAMAN VIÐ SANGARANUM OG GITTARÚRMÆLINGINUM, CHRIS RUEBENS, VIÐ TIL EINA „FRÁLÆRUKONSERT", HAR TÚ LÆRIR UM LJÓÐFØRI ÚR ØLLUM HEIMINUM OG SLEPPUR AT UPPLIVA GLEÐINA Í AT SKAPA EGNAN TÓNLEIK.



LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

LISTAGREIN:
# BYGGILIST

**Heiti:** **LEIÐ, TEINAR OG LUTFALL, TÁ MANN ER TIL GONGU**

**Listafólk:** Meduna Dalsgaard, arkitektur

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur

**Longd:** 4 skúladagar, í samráð við læraran.

**Høli:** Vanlig evningarstova.

**Krøv:** Talva og krit.

**Tíðarskeið:** Frá 3. november 2016 og frameftir







» Í VERKSTOVUNI FÁAST NÆMINGARNIR VIÐ TAÐ, VIT KENNA: SÓL, MYRKUR, HITA, KULDA, VIND OG HUGTØK Í SAMBANDI VIÐ RÚM, HÚS OG BÝ OG SO RÚMINI OG SKOTINI ÍMILLUM. TEIR KOMA AT KENNA BYGGILISTARLIGU HUGTØKINI Í HUGSAN OG Í VERKI VIÐ AT BYGGJA OG KANNA. NÆMINGARNIR FÁA VITAN UM VERANDI UMHVØRVIÐ, UPPLIVA TAÐ, LÆRA AT SKRÁSETA OG AT GERA EINA BYGGILISTARLIGA ÚTSØGN SUM MODELL.

SEINASTA SKÚLAÁR BYGDU NÆMINGAR EIN BÝ Í VERKSTOVUNI VIÐ MEDUNU DALSGAARD. EIN STUTTUR FILMUR LIGGUR Á WWW.LISTALEYPURIN.FO.



LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

LISTAGREIN:
## BÓKMENTIR

**Heiti:** **YRKJARAVERKSTOVA**

**Listafólk:** Sissal Kampmann

**Málbólkur:** 6.–10. flokkur, ein flokkur í senn (í mesta lagi 25 næmingar). Til ber at hava tvær verkstovur sama dag, til dømis a-flokkin fyrrapart og b-flokkin seinnapart.

**Longd:** Fýra verkstovur, tríggir skúlatímar hvørja ferð. Sissal vitjar flokkin eina ferð um vikuna í ein mánað.

**Høli:** Verður avtalað við skúlan.

**Krøv:** Verkætlanin ØKISLISTAFÓLK, byggir á samstarv millum næmingar, listafólk og ein lærara.

**Tíðarskeið:** November 2016





» Í YRKJARAVERKSTOVUNI ARBEIÐA NÆMINGARNIR MILLUM ANNAÐ VIÐ SPURNINGUNUM: HVAT ER EIN YRKING? HVÍ ERU SO MONG, IÐ HALDA, AT TEY IKKI SKILJA YRKINGAR? HVUSSU LESUR MANN EINA YRKING? HVUSSU SKRIVAR MANN EINA YRKING? Í YRKJARAVERKSTOVUNI HJÁ SISSAL FARA VIT AT ÞETTA SUNDUR FORDÓMAR, AT LESA OG IKKI MINST AT SKRIVA EGNAR YRKINGAR.

SISSAL KAMPMANN ER CAND.MAG. Í NORÐURLENDSKUM BÓKMENTUM OG MÁLUM OG RIT-HØVUNDUR. HON HEVUR UNDIRVÍST OG HILDIÐ FYRILESTRAR UM BÓKMENTIR OG YRKINGALIST Í FØROYUM OG UTTANLANDS.

LES MEIRA UM VERKSTOVUNA Á LISTALEYPURIN.FO

## LISTAGREIN:
## DUKKULEIKUR, VERKSTOVA

**Heiti:** **GER LEIK OG LEIKHÚS BURTUR ÚR (NÆSTAN) ONGUM**

**Listafólk:** Rakel Helmsdal

**Málbólkur:** 3.–6. flokkur, ein flokkur (um 25 næmingar) í senn. Til ber at hava eina verkstovu fyrrapart og eina seinnapart í sama skúla.

**Longd:** 4 ferðir 3 skúlatímar, eina ferð um vikuna í ein mánað.

**Høli:** Í samráð við skúlan.

**Krøv:** Verkætlanin ØKISLISTAFÓLK, byggir á samstarv millum næmingar, listafólk og ein lærara.

**Tíðarskeið:** Januar 2017





» Í VERKSTOVUNI SLEPPA NÆMINGAR AT SKRIVA EGNAN LEIK ÚR FØROYSKUM SAGNUM/ÆVINTÝRUM, AT GERA LEIKHÚS OG LEIKARAR ÚR PAPPÍRI OG AT FRAMFØRA LEIKIRNAR FYRI HVØRJUM ØÐRUM. AT ENDA FÁA NÆMINGARNIR EISINI HØVI AT SÍGGJA MARIONETTLEIKIN: „DANSA SO VÆL OG LEINGI“. VELJAST KANN MILLUM TVÆR VERKSTOVUR, EINA TIL 3. OG 4. FLOKK, HAR NÆMINGARNIR ARBEIÐA VIÐ SKUGGALEIKHÚSUM, OG EINA TIL 5. OG 6. FLOKK, HAR NÆMINGARNIR GERA „POP-UP“-LEIKHÚS.

RAKEL HELMSDAL ER MULTILISTAFÓLK, RITHØVUNDUR, MARIONETTLEIKHÚSSTJÓRI OG UNDIRVÍSARI Á LISTASKÚLA FØROYA.

LES MEIRA UM VERKSTOVUNA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO.

LISTAGREIN:
# NÝSIRKUS

**Heiti:** **DOMINO EFFEKTEN**

**Listafólk:** Rapid Eye Contemporary Circus við Samuel Gustavsson, equilibristi, André Kaliff, mimara, og Sture Ericson, saksofonleikara og tónaskaldi

**Málbólkur:** 1.–3. flokkur, 120 næmingar.

**Longd:** Framførsla í 40 minuttir, umframt tíð at byggja upp og taka niður.

**Høli:** Palløki, 6x7x3,5 m. Slætt gólv.

**Krøv:** Myrkalegging og 3 vanligar stikk-kontaktir, 220 W, á hvør sínari kreds.

**Tíðarskeið:** 9.–13. januar 2017




» Í DOMINO EFFEKTEN KANNA TVEIR RANNSÓKNARFARAR EIN HEIM, SUM ER MERKTUR AV ORSØK OG AVLEIÐING. HVUSSU ÁVIRKAR TAÐ, EG GERI, TEG? HVUSSU REAGERAR TÚ? KANN EG GERA NAKAÐ, UTTAN AT TÚ VERÐUR ÁVIRKAÐ/UR? SÝNINGIN KANNAR Í SPÆLI TANKAN UM TAÐ GANDAKENDA Í TILVILDINI. LOGIKKURIN Í TÍ MEKANISKA OG NÁTTÚRULÓGIRNAR GEVA BØRNUNUM ÍBLÁSTUR AT ROYNA SEG OG AT FARA Á SKAPANDI RANNSÓKNARFERÐ Í GERANDISDEGNUM. EIN UNDURSAMUR LJÓÐHEIMUR VERÐUR SAMSTUNDIS BORIN FRAM LIVE, M.A. Á SAKSOFON OG ØÐRUM LUTUM, SUM GEVA LJÓÐ FRÁ SÆR.



**LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO**

LISTAGREIN:
# LJÓSLIST, VERKSTOVA VIÐ FRAMSÝNING

**Heiti:** **HEIMA ER HAR, SUM HJ(ART)AÐ ER.**

**Listafólk:** Floortje Zonneveldt, myndlistakvinna, og Eva Bullens, installatiónslistakvinna

**Málbólkur:** 4.–7. flokkur. Allarbest egnað til smærri bygdarskúlar.

**Longd:** Tvær verkstovur, sum eru 2 skúlatímar. Framsýningin verður ein tími, og kann eisini verða eftir skúlatíð, so foreldur og onnur sleppa at vitja.

**Høli:** Listafólkini royna saman við skúlanum at finna eitt tómt hús tætt við skúlan. Húsið verður „innrættað“ við ljósi. Um ikki eydnast at finna eitt hús, kunnu tvær skúlastovur vera karmur um verkstaðið.

**Krøv:** Listafólkunum tørvar tíð og streymveiting til at seta upp ljóskastarar, uppvørpur og annað frammanundan.

**Tíðarskeið:** Februar 2017, eftir avtalu.





» LJÓSLISTAVERKÆTLANIN SNÝR SEG UM AT LATA NÆMINGARNAR SKAPA ÚT FRÁ SÆR SJÁLVUM. KJARNIN ER TILGONGDIN HJÁ NÆMINGINUM AT KANNA TILFAR OG ARBEIÐA VIÐ EINUM EVNI, BÆÐI SUM EINSTAKLINGUR OG Í BÓLKI. SAMAN SKAPA NÆMINGARNIR EITT STÓRT LISTAVERK VIÐ „HEIM“ SUM AÐALEVNI. VIT ROYNA Í FELAG AT UPPDAGA, HVAT EYÐMERKIR „AT FØLA SEG HEIMA“ OG AT VISUALISERA HUGTAKIÐ VIÐ EINUM STÓRUM LJÓSVERKI Í HEIMBYGDINI.



***LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO***

LISTAGREIN:
# KÓRSANGUR

**Heiti:** **KÓRLÆRA VIÐ KATA**

**Listafólk:** Kata: Greta Bech, Eyð Berghamar Jacobsen, Guðrið Hansdóttir, Arnfríð Lützen, Unn Paturson

**Málbólkur:** Allir aldursbólkar, tó í mesta lagi 30 næmingar í senn. Tað ber til at hava fleiri verkstovur sama dag á sama skúla.

**Longd:** 1–2 skúlatímar, konsert, sum varir 15 minuttir.

**Høli:** Øll høli kunnu brúkast.

**Krøv:** Í stórum høli er gott at hava ljóðanlegg.

**Tíðarskeið:** 6.–10. februar 2017



» KATA SIGUR: „VIT HAVA FYRST EINA FRAMFØRSLU AV TÓNLEIKI, SUM ER GJØRDUR TIL KÓR/KVINTETT. VIÐ FRAMFØRSLUNI SÍGGJA NÆMINGARNIR, HVUSSU TAÐ ER AT SYNGJA Í KÓRI. ÁÐRENN VIT FARA Í HOLT VIÐ AT VELJA EIN SANG, FARA VIT Í STUTTUM AT GREIÐA NÆMINGUNUM FRÁ SKALDSKAPI AV MANNA MUNNI, OG HVAT KVÆÐINI OG SKJALDRINI, IÐ VIT SYNGJA, SNÚGVA SEG UM. VIT FARA SÍÐANI Í FIMM BÓLKAR, SUM HVØR AV OKKUM LÆRIR EINA RØDD. HETTA ENDAR VIÐ EINARI FRAMFØRSLU, SUM NÆMINGARNIR HAVA. FYRI AT FÁA ØLL AT VERA VIÐ, BER EISINI TIL AT BRÚKA T.D. SLAGVERK, IKKI BARA RØDD (A CAPELLA)."



LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

LISTAGREIN:

## SJÓNLEIKUR OG VERKSTOVA

| | |
|---|---|
| **Heiti:** | **KJØKKENET** |
| **Listafólk:** | Jo Strømgren Kompani, NO |
| **Málbólkur:** | 1.–7. flokkur, 200 áskoðarar til framførsluna og 20 næmingar til verkstovuna. |
| **Longd:** | Framførsla í 45 minuttir, verkstova í 45 minuttir. |
| **Høli:** | Fimleikahøll ella mentanarhús, leikøki 6x5x3m. |
| **Krøv:** | Myrkalegging. 4 x 16 amp streymstikk. 2 hjálparar at bera útgerð inn og út og atgongd til tómt, reint høli 2,5 tímar undan sýningini. Eitt skiftirúm við spegli. Bólkurin hevur egna útgerð við. |
| **Tíðarskeið:** | 3.–7. apríl 2017 |





» Í ÚTJAÐARANUM AV EINARI BYGD ER EITT TÓMT HÚS. EIN DAGIN KOMA EIN GAMAL SJÓGARPUR OG EIN FORELDRALEYS GENTA TIL HÚSIÐ. TEY STANDA HVØR SÍNUMEGIN HÚSIÐ, OG BÆÐI HUGSA: „HER KANN EG BÚGVA." TEY HITTAST Í KØKINUM. „KJØKKENET" ER FYRSTA SÝNINGIN, SUM HEIMSKENDA DANSI- OG LEIKHÚSIÐ HEVUR FRAMLEITT TIL BØRN, OG JO STRØMGREN KOMPANI ÚR NOREGI HEVUR FRAMFØRT LEIKIN FLEIRI ENN 250 FERÐIR.

EFTIR SÝNINGINA BER TIL AT HAVA DANSIVERKSTOVU VIÐ EINUM FLOKKI. ÚTGANGSSTØÐIÐ ER GERANDISRØRSLUR – SPÆL, ÍTRÓTT, HÚSLIGT ARBEIÐI, OG BURTUR ÚR HESUM VERÐUR EIN DANSUR SKAPTUR.



***LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO***

LISTAGREIN:

## CONTEMPORARY DANSISÝNING VIÐ VERKSTOVU

**Heiti:** **TØRST**

**Listafólk:** Recoil performance group, DK

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur, 10–50 næmingar.

**Longd:** Framførsla í 25 minuttir, umframt tíð at byggja upp og taka niður. Verkstova í 60 minuttir.

**Høli:** Fimleikahøll, 10x13m, við góðum gólvi – ikki betong.

**Tíðarskeið:** 17.–21. apríl 2017





» TØRST ER EIN ORKUMIKIL DANSIDUETT UM TVEIR MENN, SUM ERU STRANDAÐIR Í KØLDUM OYÐIMARKARLANDSLAGI.

KENSLULIGA BALANSERA MENNINIR MILLUM TAÐ RÁA OG TAÐ VIÐKVÆMA, TÍ MITT Í ONGUM HAVA TEIR BARA HVØNN ANNAN. EIN ÓGVISLIG OG AKROBATISK, MEN EISINI HUMORISTISK KOREOGRAFI UM VINALAGIÐ MILLUM TVEIR MENN, DANSAÐ Á TURRUM BYLGJUPAPPI OG EFTIR LJÓÐI, IÐ ER RUSKUT SUM OYÐIMARKARSTORMUR. EFTIR FRAMFØRSLUNA VERÐUR EIN VERKSTOVA VIÐ DANSI, KOREOGRAFI OG RØRSLULIST.



***LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO***

LISTAGREIN:
# CROSSOVER-TÓNLEIKUR, KONSERT

**Heiti:** **DAGAMBA ENSEMBLE, LT**

**Listafólk:** Valters Puce, sello, Anton Trocjuk, sello, Hamidreza Rahbaralam, daf, sitar, rødd, Darvis Tenis, klaver

**Málbólkur:** 8.–10. flokkur, 100–1000 næmingar.

**Longd:** 90 minuttir.

**Høli:** Palløki, 8x4 m.

**Krøv:** Forsterkari, mikrofonir, káplar, hátalarar og mix-pultur. Verkætlanarleiðarin samskiftir við skúlarnar og listafólkini og ger av, hvussu tøkniligu krøvini best verða lokin.

**Tíðarskeið:** 18. apríl–1. mai 2017



» DAGAMBA ER EIN CROSSOVER-BÓLKUR ÚR LETTLANDI, SUM HEVUR SPÆLT Í NÓGVUM LONDUM SEINASTU ÁRINI, M.A. TVÆR FERÐIR Á GLASTONBURY FESTIVAL. LIMIRNIR SPÆLA Á KLASSISK LJÓÐFØRI, MEN SETA SAMAN TÓNLEIK HEILT FRÁ LED ZEPPELIN TIL BEETHOVEN. DAGAMBA GEVUR OKKUM EINA SERMERKTA UPPLIVING VIÐ TÓNLEIKI ÚR YMISKUM HERAÐSHORNUM OG TÍÐARSKEIÐUM OG SKAPAR EINA SERLIGA OG DYNAMISKA FRAMFØRSLU.

KONSERTBROT ERU Á WWW.LISTALEYPURIN.FO.

LISTAGREIN:

# TÓNASMÍÐ, VERKSTOVA

**Heiti:** **SMÁ TÓNASKØLD**

**Listafólk:** Figura ensemble, DK, við Peter Bruun, tónaskaldi, Annu Klett, Jesper Egelund, Frans Hansen, tónleikarum

**Málbólkur:** 1.–7. flokkur, í mesta lagi ein skúlaflokkur (30 næmingar).

**Longd:** 8 skúlatímar, 4 tímar um dagin í tveir dagar, og felagskonsert í 45 minuttir við tónleikarum og næmingum.

**Høli:** Ein skúlastova, gjarna atgongd til eykahøli til bólkaarbeiði.

**Krøv:** Sami lærari fylgir flokkinum gjøgnum verkstovutilgongdina.

**Tíðarskeið:** 26. apr.–3. mai 2017





» SMÁ TÓNASKØLD VIÐ FIGURA ENSEMBLE ERU SKAPANDI TÓNLEIKAVERKSTOVUR FYRI BØRN FRÁ 6–12 ÁR. KUNNU BØRN GERA TÓNLEIK? SJÁLVANDI KUNNU TEY TAÐ! TÓNLEIKARARNIR HJÁLPA BØRNUNUM VIÐ AT FINNA SÍN EGNA TÓNLEIK OG AT SKAPA SÍNI EGNU TÓNLEIKASTYKKIR. SAMAN VIÐ YRKISTÓNASKØLDUM MENNA BØRNINI SÍTT TÓNLEIKALIGA TILVIT, OG VIÐ VENJINGUM OG AMBOÐUM LÆRA TEY UM RÚTMU, TÓNAHÆDD, FORM OG KLANG. TÁ IÐ VERKSTOVAN ER LIÐUG, FARA ØLL HEIM SUM SMÁ TÓNASKØLD!



LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO

LISTAGREIN:

# VERKSTOVA Í EVNING OG SKRÚÐGONGA

**Heiti:** **PONCHO-SKRÚÐGONGAN**

**Listafólk:** Tentacles, NL, við Josephine Beijer

**Málbólkur:** 4.–10. flokkur, 20–25 næmingar.

**Longd:** Ein skúladagur. Dagurin endar við eini skrúðgongu – hon kann eisini vera dagin eftir. Framsýningin kann verða verandi í eina viku.

**Høli:** Ein ella tvær floksstovur og uttandura.

**Krøv:** Saksar og amboð, sum eru tøk í smíðstovuni. Ein teldu-uppvørpa til filmar og myndir.

**Tíðarskeið:** 8. mai–12. juni 2017



» HYGG UTTAN UM TEG Í GØTUNUM! EIN SKRÚÐGONGA VIÐ LITRÍKUM SKAPUM. NÆMINGARNIR HAVA GJØRT BÚNAR ÚR GOMLUM, MARGLITTUM TJØLDUM, SUM LIVA Í VINDINUM, TÁ NÆMINGARNIR FERÐAST Í GØTUNUM. Í VERKSTOVUNI LÆRA NÆMINGARNIR AT SKAPA OKKURT NÝTT ÚR ONKRUM GOMLUM. „EG HALDI, AT VIT SKULU BLÍVA VIÐ AT GERAST OVFARIN. TOY, SUM ER FORMLEYST OG EINKISIGANDI Á BORÐINUM, KANN FYLLAST VIÐ LUFT OG VERÐA TIL HVAT SUM HELST – OG TIL OKKURT STÓRT! HETTA ER EIN KOMBINATIÓN AV LIST OG NÁTTÚRUMEGI."

TAÐ ER TENTACLES PONCHO-SKRÚÐGONGAN!



*LES MEIRA Á WWW.LISTALEYPURIN.FO*

**SKÚLARNIR GJALDA EINKI FYRI VITJANIR. NORÐURLANDAHÚSIÐ, MENTAMÁLARÁÐIÐ OG KOMMUNURNAR BERA ALLAN KOSTNAÐ.**

**TEKNINGARSKJAL LIGGUR Á WWW.LISTALEYPURIN.FO HAR STENDUR EISINI MEIRA AT LESA UM TILTØKINI.**

Kommunufelagið

Mentamálaráðið

norden
Norðurlandahúsið

UMSITING HJÁ LISTAFÓLKASAMBANDI FØROYA:

Lützenstrøð 4
FO-100 Tórshavn
tel. 21 01 25

**LISTALEYPURIN@LISTALEYPURIN.FO**
**WWW.LISTALEYPURIN.FO**

FYRISKIPARAR:

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
KOMMUNUFELAGIÐ
MENTAMÁLARÁÐIÐ

SENDISTOVAN